filmurin

# Breaking and Entering

**Leikstjórin Anthony Minghella hevur leikstjórnað filmin »Braking and Entering«, hann kenna vit frá stórum episkum filmum sum The English Patient og Cold Mountain. Braking and Entering er við kendu leikarunum Jude Law, Juliette Binoche, Robin Wright Penn og Martin Freeman, men søgan er í so langrøkin og keðilig**



- *Filmurin er vælgjørdur og flottur. Tey spæla bara heilt væl, men hann er alt ov langur, ella minst ein hálvan tíma ov langur*

## Ummæli



**Kim Simonsen**
kimsimonsen@hotmail.com

Frámerkið hjá Minghella er eftirhondini hesir langu romantisku filmarnir, um lagnu og kærleika. Serliga hevur hann gjørt filmar, har kærleikin er ógjørligur og tragiskur.

Braking and Entering gongur fyri seg í økinum kring King's Cross í London í dag.

### Ein harður býarpartur

Will (Jude Law) er ein ungur og smartur arkitektur. Hann og ein samstarvsfelagi hava eina skrivstovu saman í harða býarpartinum kring King's Cross í London.

Fáar dagar eftir at teir eru fluttir, eru fleiri innbrot. Will finnur fram til hvør tað er, ið hevur stolið teirra teldur fleiri ferðir og brotið inn. Hetta er ein kringur 15 ára gamal drongur. Hann meldar hann ikki til løgregluna, men velur at bíða. Hann møtir mammuni, ið er ein seymikona frá Bosnia. Hon roynir at koma víðari við lívinum, tí maður hennara varð dripin í krígnum. Hon megnar tó ikki at uppdraga dreingin, ið stjelur og er við at enda í fangahúsinum.

Will trívist ikki heima. Hann og vakra svenska konan hjá honum eru við at gerast fremmand fyri hvørjum øðrum. Hon er svensk, og sjálvandi skal hon líða av tunglyndi, og so er hon sum sagt vøkur og ljóshærd. Hon eigur eina dóttur, ið hálvavegna er autistisk, hon er sera krevjandi og tekur alla tíð og teirra styrki.

Filmurin roynir at vísa hesa yvirstættarfamiljuna, sum er við at upploysast. Serliga eftir at Will er um at forelska seg í mammuni hjá dreinginum, ið hevur stjolið teirra teldur.

### Vælferðamelankoli

Tað er sum um hesin filmur ongantíð byrjar, Minghella leggur bert eina søgu oman á eina aðra, ein trupulleika oman á ein annan. Tað einasta, sum er felags fyri øll, er, at tey, rík og fátæk, eru ólukkulig. Her eru tvey børn, ið ikki trívast. Trý vaksin sum ikki gleðast yvir lívið.

Filmurin er vælgjørdur og flottur. Tey spæla bara heilt væl, men hann er alt ov langur, ella minst ein hálvan tíma ov langur. Minghella hevur mist tamarhald á søguni, og klipparin hevur ikki gjørt eitt gott arbeiði.

Hetta er eingin ringur filmur sum so, men hann er heldur ikki rættiliga góður, kanska alt ov penur. Eitt sindur sum Jude Law, eitt sindur ov nógv Hollywood og alt er eitt sindur for polerað og vakurt.

**4 stjørnur av 6.**



## Fakta um Breaking and Entering

**Leikandi:**
Jude Law
Juliette Binoche
Robin Wright Penn
Martin Freeman
Ray Winstone
Vera Farmiga
Rafi Gavron
Poppy Rogers
Juliet Stevenson
Romi Aboulafia
Mark Benton
Anna Chancellor
Ting-Ting Hu
Eleanor Matsuura
Rad Lazar
Eddie Joseph

**Leikstjóri**

Anthony Minghella. 1 tími og 59 minuttir. Sýndur í Havnar Bio frá fríggjadegnum 16. februar 2007.

Sosialurin